

# Tónleikur

**Sosialurin er hvønn hósdag farin at gera meira burtur úr tónleiki. Sunneva Háberg Eysturstein, sum er ein av Føroya bestu og mest beinraknu tónleikaummælarum, ummælir nýggjar fløguútgávur og ger javnan samrøður við tónleikabólkar ella einstaklingar.**

## Mpiri

# Upp Gleðist

**UMMÆLI** ★★★☆☆☆

**Tutl**

A capella kórtónleikur er ein stuttlig og løgin vera. Tað eru naknar røddir, ið mugu harmonisera fullkomið, fyri at heildin skal ljóða væl. Og tað er ikki bara sum at siga tað at fáa røddirnar at sita rætt, serliga tá tær eru nógvar í tali. Tær verða formidlaðar ígjøgnum eitt øgiliga kompliserað og ógvusligt ljóðføri; likamið. Og kunnu einans formidlast væl, um likamið hevur førleika til tað. Tað er eitt stórt listarligt avrik at megna hetta, ið krevur nógv sjálvdisiplin og mong ár av venjing.

### Sterka heildin hálast niður

Vokalbólkurin Mpiri stendur av 13 føroyskum sangarnum, ið eru búðsettir í Danmark. Bólkurin gav til jólar út fløguna »Upp gleðist«, ið er eitt savn av klassiskum jólaløgum í nýggjum útsetingum eins væl og nýggjari tilfari.

Samljóð og raddarstyrki koma ordiliga til sjóndar á hesi útgávuni, ið sum heild er væl eydnað



við fleiri góðum útsetingum. Tó eru nøkur fá element, ið hála nógv niður. Hesi elementini hoyrast bert á nøkrum heilt fáum løgum, og tað er eitt sindur spell, at hesi løgini ikki eru blivin soldað burtur. Tí uttan tey hevði útgávan fingið ein hægri karakter.

### Ymsar útsetingar

Løgini á fløguni eru ógvuliga varierandi. Frá vøkrum, friðarligum útsetingum so sum »Fra Himlen højt kom budskab her« eftir Bjarna Restorff og »Føgur er Foldin« eftir Sunleif Rasmussen til stressutar útsetingar av barnaløgum sum »Nissumamma og nissupápi« eftir Leif Hansen og »Hygg Kavin« eftir Unn Patursson.

Frá abstraktum útsetingum sum »Upp gleðist« og »Rottujól« eftir Trónd Bogason til øgiliga sveimandi popp útsetingar so sum »Eg gleðist so hvørt jólakvøld« eftir Niels Nørgaard, ið harafturat eisini inniheldur solosang av Guðrun Sólju Jacobsen.

### Bæði og

Sumt er gott, og sumt er øgiliga nógv minni gott. Stressutu barnaløgini hava stuttligar útsetingar, men eru harafturímóti alt ov irriterandi at sita og lurta eftir. Samljóðini eru sum heild ótrúliga beinrakin og flott, men tað er ov ofta, at høgu tónarnir blíva skeivir, og heildin kollapsar. Hetta skínir serliga ígjøgnum í »Ein dreymur«, har tað blívur púra galið hjá sopranunum.

Tó verður støðið lyft nakað upp aftur við vøkru útsetingini hjá Jensinu Olsen av jólaevangeliinum og útsetingini hjá Agnar Lamhauge av »Et Barn er fød i Bethlehem«. Eisini »Føgur er Foldin« er ógvuliga væl sungið og kemur væl til sín rætt við útsetingini hjá Sunleifi Rasmussen.

Alt í alt er »Upp gleðist« ein miðal góð útgáva við bæði knasandi góðum og ræðuliga keðiligum tilfari á. Tí fær hon ein miðal karakter.

## Tíðindi

# Frá nútíðar teldutøkni til uppruna tøli

**Hann hevur komponerað fyri svensku superstjørnurnar Ace of Base, skrivað ringitónar fyri Nokia og hildið fyrilestrar runt í heiminum. Hann kallar seg Goodiepal og er ein av heimsins fáu veruligu originalum, ið altíð leitar eftir nýggjum leiðum til at flyta bæði sálarlig og samfelagslig mørk. Hann hevur áður vitjað klettarnar her, men kemur nú aftur í næstu viku at hava verksmiðju í Norðurlandahúsinum**

Seinastu árini hevur Goodiepal vitjað nakrar ferðir í Føroyum. Á G! Festival 2005 hevði hann tvær framførslur í Køstinum; listainnleggingini, ið Ole Wich og Tummas Jákup Thomsen gjørdu í einum gomlum, illa farnum virkishúsi í Gøtu. Nú kemur hann aftur at hava verksmiðju í tónleikakomposition í Norðurlandahúsinum tann 14. og 15. mars.

### Aftanfyri pallin

»Flest øll hava ongantíð hoyrt um mannin, men hóast tað er hann ein av teimum, um ikki tann, mest viðurkendi danski elektroniski tónleikarin ígjøgnum síðsta áratíggju«, skrivar m.a



*Danski tónlistarmaðurin Goodiepal hevur verið virkin í nógv ár innan elektroniskan tónleik og modernaða komposition. Hann kemur nú til Føroyar tann 14. og 15. mars at hava verkstað í tónleikakomposition*



*Goodiepal hevði í 2005 tvær framførslur á G! Eina við heimagjørda, mekaniska pipp-fuglinum og eina, har hann saman við børnum í bygdini spældi á ymisk heimagjørd ljóðføri, eins og sæst her omanfyri*

Politikken um Goodiepal.

Goodiepal hevur verið virkin í nógv ár innan elektroniskan tónleik og modernaða komposition. Sum heilt ungur byrjaði hann at komponera á Commodore 64. Hann hevur m.a gjørt programmeringar til stóru svensku 90ara stjørnurnar Ace of Base og heimsumfatandi teleketuna Nokia.

Hann hevur altíð brúkt telduna sum amboð til at gera elektroniskan tónleik, og hevur enntá verið við til at útvikla nýtt tónleikasoftware. Men nú hevur hann boykottað telduna og er farin aftur til gomul, heimagjørd ljóðføri. T.d tann sjálvgjørda mekaniska fuglin, ið var útstillaður í Køstinum á G! 2005, og traditionellar, stoyptar klokkur.

Útviklingin, ið Goodiepal hevur verið ígjøgnum seinastu tíggju árini, botnar í einari orsøk; í einum ævigum forvitni eftir at finna nýggj ljóð og nýggjar vegir í tónleikinum; at royna av og finna fram til teoriir um, hvussu tónleikur fer at ljóða í framtíðini.

### Hvønn veg fara vit?

14. og 15 mars frá kl. 10.00 til 18.00 verður verkstaður við Goodiepal í Norðurlandahúsinum, ið er komin í lag ígjøgnum samstarv millum Jazzfelagið og Norðurlandahúsið. Spurningarnir, ið verða viðgjørd, eru m.a hesir:

Hvørja leið fer tónlistarliga úttrykkið í einum heimi, har øll eiga teldu og hava atgongd til eitt ótal av ljóðførum við framúr góðari góðsku – bara ígjøgnum nøkur fá músaklikk? Hvat er framskygdur tónlistarligur kreativitetur ár 2008? Skal teldan sjálv læra at komponera, tá kunstigur intelligensur loksins blívur veruleiki? Skulu vit fara aftur til at notera tónleikin grafiskt?

### Mørk skulu flytast

Verkstaðurin er fyri øll, ið hava hug til vera við at granska tónlistarlig úttrykk. Tær nýtist ikki at duga at spæla nakað ljóðføri. Bara tú hevur eitt opið sinn.

Sjálvur verkstaðurin er lagdur til rættis sum ein lærubók, ið luttakararnir skulu vera við til at skriva. Luttakaranir fáa møguleika fyri at flyta síni mørk, har tey eru sett fyri fatanina av tónleiki og tónleikakomposition. Endamálið er, at verkið, ið verður skapt, skal skapast út frá einum so breiðum sjónarhornið sum gjørligt.

### Luttøka

Til tess at tey, ið luttaka, skulu fáa eina optimala uppliving, hevur Goodiepal biðið hvønn einstakan um at hyggja at einum videoklippi, áðrenn komið verður til klassan. Videoklippið kann síggjast á *http://blog.wfmu.org/freeform/2008/01/goodiepal-and-t.html*. Finn fleiri upplýsingar um Goodiepal á myspace.com/goodiepal.

Spurningar annars kunnu setast til Ole Wich á tlf 27 38 40. Tilmelding fer fram á telefon 351351 ella *á nlh@nlh.fo.* Kostnaður er kr 200,- við kaffi og køku.